

# Ein virkin ítróttarmaður farin

*Týsdagin 30. mai 2000 andaðist Ólavur Lambaa 72 ára gamal.*

Ólavur varð føddur í Stóravík í Íslandi tann 10. august 1927. Hann vaks upp í Havnini, og komin til mans var hann eitt skifti til skips og fór síðan í bankalæru í Føroya Banka. Í bankanum hevði hann sítt lívsstarv, og var avhildin maður millum starvsfólkið har. Hann grundlegði bankaskúlan, sum hevur verið til stórt gagn fyri tey mongu, sum komu í bankalæru.

Ólavur hevði altíð stóran áhuga fyri ítrótti. Hann greiddi mær einaferð frá, at hann 5-6 ára gamal saman við javnaldrum fóru at sparka bólt í miðjari Havnini. Tá gekk bóltspælið fyri seg niðri í Bø, uttan fyri hjá Hornabakaranum, úti á Reyni við ”Ydun” og uppi á Heygsbreyt. Sum bilarnir tóku seg fram, varð farið í gamla Kommunuskúlagarðin, nú Býðráðið, at spæla hondbólt og fótbólt.

Víðari greiddi hann frá, at 8 ára gamal tók ein eldri frændi seg við niðan í Gundadal at hyggja at fótbóltsdysti, og so var liðugt. Hóast hann lítið skilti av leikinum á hesum ovurstóra vølli, so var hann onkursvegna bitin av hesum, og sum vit vita, gjørdist Ólavur ein sera góður ítróttamaður.

Hann bleiv kallaður tann aktivi ítróttarmaðurin. Hann íðkaði fimleik, róði kapp, leikti bólt í 1. deild hjá HB í mong ár. Hann hevði góðan hug at kappast og royndi seg á øllum plássum í HB. Best dámdi honum at spæla frammi, men sínar bestu dystir spældi hann bakkur. Ólavur leikti við Býliðnum í Hetlandi í 1951 og kom á Landsliðið sum bakkur í 1955 og 1957. Hann var eisini hondbóltsspælari og var liðskipari hjá mansliðnum í Neistanum í mong ár.

Eisini vóru boð eftir Ólavi at vera ferðaleiðari, millum annað tá ið kvinnuliðið hjá Havnar Fimleikafelag í 1966 og 1970 fór til Noreg og Danmark at vísa sín vakra fimleik fram, og hjá fótbóltslandsliðnum í Orknoyggjum, Hetlandi og Íslandi.

Hann var formaður í HB 1953 og 1961. Eisini var hann kappingarstjóri hjá Ítróttasamband Føroya eitt skifti og hjálpti til at skriva Ítróttatíðindi.

Í 1962 var Ólavur Lambaa valdur sum tann triði forsetin fyri Ítróttasamband Føroya, har hann sat í 10 ár. Í hansara tíð vaks virksemið hjá ÍSF so nógv, at felagsskapurin varð býttur sundur í deildir fyri hvørja ítróttagrein sær.

Á samkomu tann 4. mai 1982 fekk Ólavur Lambaa handað gullmerki ÍSF við bjálka.

Tað má ásannast, at teir menn, sum innan føroyskan ítrótt hava lagt so nógv fyri sum Ólavur Lambaa, eiga at vera minstir við virðing og takksemi.

Friður verði við minninum um Ólavur Lambaa.

**Ítróttasamband Føroya**
**Heðin Mortensen**
**forseti**

## Stórfingin bókagáva:

# Ein tøkk til Emil

*Emil Juul Thomsen hevur, við Bókagarði sínum, so mangan gjørt føroyingar ovfarnar, síðani einaferð í 60'árunum. Hvør minnist ikki tey ódnartøk, ið mangan vórðu tikin til tess at útvega okkum bókmentir í heimsklassa á føroyskum máli. Hann hevur ríkað føroyska bókaheimin meira enn nakar annar. Nú um dagarnar tók hann okkum aftur á bóli við stórfingnari bókagávu til føroysk skúlabørn*



*Hanus T. Bærentsen, flokslærari, handar formanninum í næmingaráðnum, Vígdis Kristiansdóttir, bókagávuna*

Emil byrjaði í 60'árunum við mentanarliga virksemi sínum, og undirtøkan frá føroyingum var góð. Tá var illa statt her á landi viðvíkjandi bókum. Langt var ímillum útgávurnar, og ofta var góðskan ivasom. Bókagarður kom í tøkum tíma og ikki minst innan skúlagátt var fagnaðurin stórur.

Varðin kom at standa í so gott sum hvørjum húsi og var ein ófør stimbran av føroyskari mentan, sum fólkið, tá ið løtur góvust, kundi taka til aftur og aftur. Sera vælumtókt bókarøð. Síðani er at nevna øll tey verk av frægastu mentamonnum okkara, sum Emil gav okkum atgongd til, verk av t.d. Heðini Brú, Martini Joensen, Wililami Heinesen, Jørgen F. JaCobsen, Christiani Matras, Karsteni Hoydal, Sverra Patursson, Valdemari Poulsen. H. D. Joensen, Louis Zachariassen, T. N. Djurhuus, Jakob Jakobsen, Jens Paula Heinesen o.s.fr.

Síðani er ikki at gloyma teir stóru, rithøvundarnar, ið skaptu heimsbókmentirnar, sum vit knappliga fingu møguleika at lesa á móðurmálinum, hetta eru t.d. Mark Twain, F. M. Dostojevskij, Albert Camus, Knut Hamsun, Voltaire, Halldór Laxness o.fl.

Harafturat hevur Emil við Bókagarði ríkað føroysku heimini og ikki minst føroyska skúlan við einum hópi av størri og smærri skriftum líka frá orðabókum til barnabókmentir, frá íslendskum søgum til Faroe Isles Review og frá lívfrøðislæru til yrkingasøvn, eitt óvanliga stórt og fjølbroytt úrval. Føroyski skúlin hevur áður víst stórt takksemi fyri alt tað nógva lesitilfarið, sum er komið á føroyskum máli, eisini fyri slíkt, sum er uppafturpentað av útgingnum bókum og ritum.

Felags fyri úrvalið og útgávurnar hjá Bókagarði er ein kritiskur sansur og ein ansur fyri at seta dygdina í hásæti.

Í 1978 varð Emil Juul Thomsen heiðraður fyri megnarverk sítt. Tá veittraði føroyska flaggið uttan fyri dómkirkjuna í svenska býnum Lund. Orsøkin var, at nøkur fólk vórðu gjørd heiðursdoktarar fyri eitthvørt vísindaligt ella mentanarligt avrik. Teirra millum var ein føroyingur – Emil Juul Thomsen varð gjørdur heiðursdoktari við universitetið í Lund.

Sverri Egholm, fyrrverandi landsbókavørur, segði longu í 1978 um Emil: Tað, sum Emil Thomsen hevur avrikið eftir 10 árum, er meira enn einn manndómsbragd. Tað er eitt ótrúligt undur, ið hvat tú so annars heldur um mannin og verkið.

Vit vita, at Emil og Bókagarður síðani tá hava avrikað munandi meira, og at undurið er vorðið uppaftur meira ótrúligt. Millum dýrgripirnar seinastu árini er ikki minst at rokna nýggjasta útgávan við kvæðaskatti okkara. Føroyingar munnu vera takksamir.

Ein av perlunum, sum Bókagarður hevur latið føroyingum, er verkið: Kirkjubøstólarnir og Kirkjubøur. Nú um dagarnar boðaði Emil Juul Thomsen okkum frá, at hann hevði tikið ta avgerð at lata hvørjum skúlabarni eina gávu, og tað skuldi vera henda bókin.

Vit vita, at føroyingar eru tær takksamir. Tú hevur fingið vðrilig ummæli frá bókmentafólki í mongum londum og tú vart gjørdur heiðursdoktari við universitetið í Lund, størsti akademiski heiður, sum gevst við eitt lærdómssetur.

Hesi orð eru ikki skrivað fyri at reklamera fyri tær ella Bókagarði, tað man ikki vera neyðugt, men eru bert ein hgjartans tøkk fyri avrik tíni og ikki minst fyri ta stóru gávu, tú nú um dagarnar gavst føroyskum skúlabørnum og lærarum teirra, og sum børnini her í Norðoyggjum kanska vóru tey fyrstu at taka ímóti og nú kunnu frøast um. Takk fyri.

**E. Hentze**



*Fjórði flokkur við bókagávuni*



*Løgmaður eina viku undan mest avgerandi samráðingaumfarinum við danir:*

# Tað er nú slagið skal standa

*- Vit hava alla tíðina sagt, at vit mugu fáa eina skiftistíð skrúvað soleiðis saman, at fólk við eina fólkaatkvøðu trúgva uppá, at hetta ikki verður at merkja sum nøkur kollvelting ella nakar turbulensur fyri teirra gerandisdag. Uttan tað gongur hetta ikki. Tí er ein skiftistíð uppá fýra ár ikki nøktandi grundarlag fyri eini fólkaatkvøðu sigur løgmaður, sum vísir á at tað springandi punktið, ið vit heilt ítøkiliga eru ósamdir um, er fíggjarligi parturin. Tað er har slagið kemur at standa.*



*Fíggjarligi parturin er springandi punktið í samráðingunum. Hann er ein tann mest týðandi, og tað verður tað komandi samráðingarnar fara at snúgva seg um sigur løgmaður, sum hóast hann ikki útilokar, at landsstýrið kemur heimaftur sum av torvheiðum, kortini fer at fáa eina semju við danir.*

JAN MÜLLER

-Talan er um agurkutíðir, tá nógv verður gjørt burtur úr mínum úttalilsum í einum grønlendskum blað, tí tað er als einki nýtt í hesum. Hetta sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður í eini viðmerking til, at Útvarp Føroya í vikuni endurgav úttalilsi hansara í grønlendska blaðnum sum var tað ein stór sensatión.

-Tað er als einki nýtt í hesum. Eg havi jú fyrr sagt, at vit fara ikki út í eina fólkaatkvøða við eini skiftistíð, sum fólkið ikki góðtekur leggur løgmaður áherðslu á.

Hann vísir annars á, at tann búskaparligi spurningurin verður høvuðsmálið til komandi samráðingar við danir.

-Vit hava alla tíðina sagt, at vit mugu fáa eina skiftistíð skrúvað soleiðis saman, at fólk við eina fólkaatkvøðu trúgva uppá, at hetta ikki verður at merkja sum nøkur kollvelting ella nakar turbulensur fyri teirra gerandisdag. Uttan tað gongur hetta ikki.

Løgmaður vísir á, at landsstýrið hevur spælt greitt út, og tað sama hevur danska stjórnin. Har standa partarnir nú undan triðja umfarinum í samráðingunum.

-Nú seta vit okkum niður við borðið og vita, um vit finna fram til eina semju, sum báðir partar eru nøgdir við. Koma vit ikki hartil, so hava vit ein stóran trupulleika, tí tá semjast vit ikki um eitt av høvuðspunktunum. Og tað skulu tveir partar til fyri at gera ein avtalu staðfestir løgmaður.

Løgmaður vísir annars á, at tað frá 1. til 2. umfar vórðu gjørd stór framstig, har tað skulu gerast útgreiningar av ymsum slag. Hann ivast heldur ikki í, at tað verður gjørd semja um tey notat, sum har verða løgd á borðið.

-Tað springandi punktið, sum vit heilt ítøkiliga eru ósamdir um, er fíggjarligi parturin, ið er ein sera avgerandi partur av øllum samráðingunum. Tað er har slagið kemur at standa.

Løgmaður sigur, at teir hava fyrireikað seg væl.

-Vit hava eitt mál, og tað eru nógvir mátar at skrúva tingini saman uppá fyri at røkka málinum. Kunnu vit tí fara inn í konstruktivar samráðingar við tí endamáli at finna eina loysn, so dugi eg ikki at síggja annað enn, at vit kunnu gera eina avtalu.

### Skuld og olja

Uppá fyrispurning um skuldin til Danmarkar kann koma inn í myndina í komandi samráðingum sigur løgmaður, at hana hava vit sum er eina greiða avtalu um.

-Eg dugi ikki at síggja, at man skal taka skuldina uppí samráðingarnar uttan so, at man frá danskari síðu ynskir tað við í eina heild. Alt er tó opið.

*-Spurningurin um olju varð eisini við í samráðingunum seinast. Hvat liggur í tí?*

-Oljan er brúkt so oftani. Hon er longu í dag ein partur av verandi skipan. Um tað verður funnin olja í føroyskum sjógvi so sigur avtalan um ráevni í undirgrundini, at spurningurin um blokkin skal takast til viðgerðar. Tað er júst tað sama, sum hendir her. Nú tekur tú blokkin upp, og spurningurin er so, um tað kann kombinerast uppá nakran máta. Tað, sum eg síggi er ein trupulleiki fyri danskar politikarar, er at gera eina langa avtalu við Føroyar um yvirgangsskipan og tað í hesum tíðarskeiði bráddliga koma inntøkur frá oljuni samtíðis sum vit fáa milliardir úr Danmark.

Løgmaður sigur, at teir hava spælt út, at teir eru tilreiðar eisini at umrøða spurningar á hasum økinum.

### Heim av torvheiðum

Nú bert ein vika er til samráðingarnar við danir viðgongur løgmaður, at møguleikin fyri at koma heimaftur sum av torvheiðum er stórur, heldur danska stjórnin fast uppá sítt. Men tí noktar at at trúgva við úrslitinum av 2. umfari í huganum.

Uppá fyrispurning verður hetta verður úrslitið, um landsstýrið ikki tá hevur spælt fallit, og tí eigur at leggja frá sær, sigur løgmaður, at hetta er ein hypotetiskur spurningur. Hann hevur onga viðmerking í núverandi støðu, tí hann hevur ikki mist vónina at fáa eina avtalu.

### Veljarakanningin

*-Um tað nú endar við, at danir bara vilja góðtaka eina skiftistíð uppá fýra ár, hvat ger tú so?*

-Um so verður, tá hava vit ta seinastu veljarakanningina at halda okkum til. Hon skal tó sjálvandi takast við tí fyrivarni, ið liggur í henni. Men har siga 25% av Føroya fólki, at tey taka undir við eini slíkari skiftistíð, og tað eftir míni metan langt frá at kunna nøkta tað, sum vit hava sett okkum sum mál, nevniliga, at tað skal verða breiður meiriluti fyri tí, sum vit gera.

*-Kann tað hugsast, at danska stjórnin brúkar føroyskar veljarakanningar í sínum taktikki?*

-Tað veit eg ikki. Handa spurningin mugu tit seta forsætisráðharranum. Tað er ein sannroynd, at hetta málið er sera populert í donskum innanríkispolitikki. Og tað skal man ikki lata eyguni aftur fyri.

Anfinn Kallberg sigur, at verða teir líka positivt yvirraskaðir frá 2. til 3. ferð sum frá 1. til 2. ferð í samráðingunum, so trýr hann, at vit fáa nakað konstruktivt burtur úr.

### Nógv um at vera

Fundurin verður hósdagin 15. juni klokkan 16. Løgmaður dugir ikki at siga, hvussu leingi fundurin kann vara. Hann vísir á, at tað er sera torført at fáa ásett fundir, og tað vísir seg eisini at vera nógv á skránni her heima komandi dagarnar. Drotningin vitjar, og haraftrat er ein fundur í Føroyum fyri samstarvsráðharrarnar í Norðurlondum. Teir fara ikki avstað aftur fyrr enn hósdagin í næstu viku, og tað merkir, at Høgni Hoydal kann ikki verða í Keypmannahavn fyrr enn klokkan 15 hósdagin, tvs. ein tíma undan samráðingunum.

-Vit hava roynt at finna eina aðra tíð, sum liggur nær tí ætlaðu, men tað vísir seg at vera ómøguligt.

*-Heldur tú, at danir eru ómøguligir í so máta?*

-Tað veit eg ikki. Skulu teir hava fimm tungar ráðharrar við borðið nettupp í hesum døgum, tá mong stórmál eru fyri, eitt nú spurningurin um gjaldoyra, so er tað ikki so lætt at fáa tingini at fella saman.

Løgmaður vil tó meta, at danir áttu at prioriterað hetta fram um nógv annað. Men hann er so ikki harri yvir, hvussu arbeiðskallendarin hjá donskum ráðharrum sær út.

# Myndakalendarin hjá Absalon komin



Absalon Hansen hevur fjórða árið á rað gjørt ein myndakalendara við myndum úr føroysku náttúruni.

Kalendarin leggur seg ikki serliga eftir at avmynda býir og bygdir, men heldur landsløg og djóralív.

Myndakalendarin verður keyptur av bæði føroyingum og útlendindum, og at kalendarin fyri 2001 longu fæst til keyps er sjálvandi tí, at nógv ferðafólk eru í Føroyum hesa ársins tíð.

Absalon Hansen, sum hevur tikið allar myndirnar í kalendaranum, sigur, at sølan av kalendaran hevur gingið betur fyri hvørt ár, síðani hann av fyrstan tíð varð útgivin.

Myndakalendarin kostar 65 krónur.